# Vodafone er veruliga í gávuhýri






Vodafone er veruliga í gávuhýri í hesum døgum við jólakalendara, góðum tilboðum upp á telefonir og tvífalda talutíð av øllum talutíðarkortum – eisini av 1000 SMS.

Jólakampanjan hjá Vodafone byrjaði síðstu vikuna í november við t.d. einum jólakalendara á netinum, har Vodafone jólamaðurin Virgar ger mangt og hvat og møguleiki er at vinna ein gávulut frá Vodafone hvønn dag. Harumframt hava vit havt ymisk tilboð upp á telefonir gjøgnum fleiri vikur. Eisini hava vit latið Tvífalda Talutíð frá síðst í november til og við nýggjársaftan. Vit ynskja fegin, at okkara jólakampanja kemur øllum okkara kundum til góðar, sigur Gudny Langgaard, sølu- og marknaðarstjóri hjá Vodafone, og hava vit tískil varierað okkara átøk øllum til frama.

Vodafone handilin í SMS er eisini moderniseraður og lat upp av nýggjum tann 1. november. Umframt handilin í SMS hevur Vodafone søluumboð hjá NEMA-handlunum kring landið, El-handlinum á Tvøroyri og Ellubitanum á Sandi. Høvuðssætið hjá Vodafone er á Óðinshædd í Havn. Har er móttøka og møguleiki fyri at gjalda rokningar, keypa talutíð, skifta og stovna hald o.s.fr.

Gudny sigur, at umframt Tvífalda Talutíð hevur Vodafone veruliga nøkur góð jólagávuhugskot. Serliga telefonirnar, ið nú eru upp á tilboð sum t.d. iPhone4 – 16GB, sum er fylt við framkomnari tøkni og er ein av mest framkomnu smart telefonum á marknaðinum, Nokia 6700 Slide fæst í litunum pink, lime ella bláum, er ein lekkur slide-telefon við m.a. FM-radio, 5mp myndatóli við blitsi, Sony Eriksson X10 Mini er ein Android-telefon við touchscreen og hevur m.a. FM-radio, 5MP myndatól, WIFI, kumpass og GPS-ara, ella eina Sony Eriksson F100 Jalou, sum er ein lekkur klapptelefon við m.a. fet-teljara, BMI- roknara, 3,2 mp myndatóli, mp3/mp4 videoupptakara, 3G, bluetooth, FM-radio og interneti. Allar telefonirnar verða seldar við stórum avsláttri. Vodafone hevur í seinastu viku eisini lagt bíligari telefonir við startpakkum til sølu í flestu Magnstøðum og Fast-handlum kring landið. Hesar telefonir, við telefonnummari og talutíð, verða seldar fyri 299 kr. Harumframt hava vit selt smarttelefonir, Vodafone 845 og BlackBerry, sera bíliga, saman við datapakkum. Hetta er eydnast so mikið væl, at vit tíðanverri eru útseld.

Fólk hava tikið sera væl ímóti okkara jólatilboðum, sigur Gudny Langgaard, sum bjóðar øllum at vera vælkomin í Vodafone handilin í SMS og Vodafone umboðini kring landið.

# Matas jólagávur til alla familjuna




Matas í SMS er ein handil við jólagávuhugskotum til alla familjuna. Matas hevur eitt breitt úrval av vørum, sum eru við til at geva tær eina kenslu av kropsligari javnvág og vælveru.

Matas í Føroyum er ein partur av donsku handilsketuni, Matas, sum fevnir um 300 handlar í Danmark, Svøríki, Grønlandi og Føroyum.

Í Matas handlinum siga vit soleiðis: "Vit ynskja at hjálpa kundum okkara at hava tað gott, bæði tá talan er um útsjónd og kropsliga vælveru - fyri rímiligar pengar". Starvsfólkini í handlum okkara, leggja stóran dent á at møta ynskunum hjá kundum okkara og geva fakliga vegleiðing til kundin er fullkomiliga nøgdur.

Í sambandi við jólini hevur Matas hópin av gávuhugskotum. Til húðrøkt er nógv ymiskt at fáa sum t.d. Manhattan Clearface, ið er ein andlitsrøð, sum reinsar óreina húð og virkar antibakterielt á húðina. Ein onnur røð er Dr. Scheller, sum er gjørd úr náttúruúrdráttum og hóskar væl til dagligu húðrøktina. Matas Granatsúreplarøðin, sum gevur húðini eyka vætu og verjur húðina væl, er sera væl egnað til kvinnur í øllum aldursbólkum.

Til kvinnuna hevur Matas nærum alt sum ein kvinna kann ynskja sær t.d. smyrsl og mascara av ymsum sløgum og ymiskt til kropsrøkt og andlit. Stutt sagt alt sum kann fáa eina kvinnu til at kenna seg sum nakað heilt serligt.

Matas hevur eisini eitt stórt úrval til mannfólk, bæði tá talan er um andlitsrøkt, kropsrøkt og duftir t.d. gávueskjur við t.d. parfumu og deospray ella bodyshampoo, bodylotion og deodorant. Maðurin skal eisini forkelast!

Týdningamikið at nevna at Matas er ein handil, sum leggur dent á at verja umhvørvið.

Matas hevur eisini eina fullkomna pinkubarnarøð, sum er tann einasta røðin til børn sum hevur fingið øll trý umhvørvismerkini tvs. Astma- & allergimerkið, Eco-merkið og Svanamerkið.

Onnur jólagávushugskot eru t.d. krúllujørn til kvinnur og hártrimmarar ella næsa- og oyratrimmarar til menn, ella elektroniskar blóðtrýstmátarar og fepurstokkar.

Matas hevur eisini nógv úrval av nattúruheilivági, sum fevnir bæði um vitaminir, mineralir, ymisk sløg av the og mangt annað.

Eitt hugskot er t.d. elektroniska gávukortið, sum kann nýtast í øllum Matas handlum.

Vit eru væl mannað á jólum og gera okkum serligan ómak at pakka gávurnar inn í vakurt jólagávupappír. So øll eru vælkomin inn til okkum at finna tað jólagávuna tey leita eftir, sigur Miriam Thomassen leiðari í Matas í SMS.